# Eitt nýtt bein at standa á

**Skipasmiðjan á Skála er farin aftur á gamlar gøtur, nú teir byrja at smíða skip aftur. Næsti sáttmálin stendur møguliga á trappuni. Dánjal Andreasen, leiðari, váttar, at teir arbeiða við einum nýggjum sáttmála, og at vónirnar eru góðar um at fáa uppgávuna**

SKIPASMIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í morgun varð boðið til tíðindafund í kaffitovuni í Skipasmiðjuni á Skála. Hetta í samband við, at teir byrjaðu at skera stálið til nýggja hjálpar- & veitingarskipið hjá Thor, sum skal smíðast á Skála.

Dánjal Andreasen er leiðari á Skipasmiðjuni á Skála. Sosialurin fekk orðið á hann eftir móttøkuna í morgun.

### Rørandi løta

- Nú eru vit komnir so langt. Her er veruligt veitslulag. Tú sært, at arbeiðsmenninir eru í góðum hýri, sigur Dánjal Andreasen.

- Eg havi starvast her í 4 ár. Summir hava verið her nógv longri, og teir hava eisini upplivað tað síðsta skipasmíðið, sum var í 1988. Tað er heilt vist, at hetta er ein rørandi løta fyri teir, sum hava verið á Skipasmiðjuni øll árini, sigur Dánjal.

- Teir ungu eru eisini sera spentir uppá hetta. Tað er ein stórur dagur fyri Skipasmiðjuna. Tú kanst siga, at vit hava fingið eitt eyka bein at standa á, sigur Dánjal.

Nógvar fyrireikingar hava verið gjørdar í samband við skipasmíðið. Skipasmiðjan hevur fingið eina veruliga yvirháling.

- Vit hava endurnýggjað útgerðina á Skipasmiðjuni. Tað er nógv vatn runnið í ánni síðani 1988, og tí noyddust vit at keypa nýggja útgerð. Vit hava hava brúkt 6-7 milliónir uppá at endurnýggjað Skipasmiðjuna, sigur Dánjal.

### Næsti sáttmálin á trappuni?

Teir vóna, at hetta einans verður byrjanin, og at skipabygging aftur verður ein partur av gerandisdegnum á Skála.

- Tá ið hetta skipið verður liðugt 10. oktober næsta ár, vóna vit at byrja uppá tað næsta.

Spurdur, hvat hetta merkir meira ítøkiligt, svarar Dánjal:

- Vit eru longu byrjaðir at arbeiða uppá at fáa fleiri uppgávur. Vit eru í samráðingum um eitt nýtt skip, og vit hava góðar vónir um at fáa hetta arbeiðið. So um alt gongur eftir vild, kunnu vit byrja uppá næsta skipið, tá ið hetta verður liðugt, sigur hann.

Tríggir pólendingar eru á Skála í skrivandi stund. Mánadagin koma 25 aðrir til landið, og tá kemur veruligt glið á arbeiðið.



*Hans Andreas og Gunnbjørn Joensen frá Thor eru her saman við Dánjali Andreasen og Thormundi Johannessen frá Skipasmiðjuni*
*Mynd: Høgni Thomsen*

*Magnus Joensen, vinstrumegin, pápi Hans Andreas og Gunnbjørn Joensen, slapp at tendra skerimaskinuna*
*Mynd: Høgni Thomsen*




KUNDARÁÐGEVI

## Kundaráðgevi til avbjóðandi starv í Kollafirði

Vit sóknast eftir kundaráðgeva til deild okkara í Kollafirði.

Sum kundaráðgevi fært tú stórar avbjóðingar í tøttum samarbeiði við hini starvsfólkini á deildini.

**Starvið**
Tín fremsta uppgáva verður at veita kundanum heildarráðgeving. Dentur verður lagdur á ráðgeving um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan, m.a. innlán, útlán, pensjón, íløgur, tryggingar og gjaldsmidling.

**Uppgávurnar hjá tær fevna um**
– ábyrgd og røkt av egnum kundum
– heildarráðgeving og sølu
– kredittviðgerð
– ymiskar ad-hoc uppgávur

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja okkum ein jaligan starvsfelaga við góðum samstarvsevnum, hugi og evni at arbeiða við kundum, og sum kann ganga undan.

Vit vænta, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi, og at tú hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.

**Fakligir eginleikar**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og løn verður ásett sambært avtalu.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Øssur Skeel Nolsøe, økisleiðara, tel. 548300 ella Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel. 348510, teldupostur marjun.eystberg@sparikassin.fo

Umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. desember kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Føroya Sparikassi
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

VÁSTI 458010

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið Inni og Eik Bank. Í samtakinum starvast 259 fólk og á deildini í Kollafirði starvast í løtuni 4 fólk.

FØROYA SPARIKASSI


# Byrja uppá næsta skip tá hetta er liðugt

**- Vit arbeiða við tí. Eitt skip er als ikki nóg mikið. Vit vóna avgjørt, at vit hava næstu uppgávuna klára, tá ið hetta skipið verður liðugt, sigur Gunnar Mohr, stjóri, um ein møguligan nýggjan sáttmála um skipasmíð. Hann vil tó ikki siga nakað meira ítøkiligt**

SKIPASMÍÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Gunnar Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni, er væl nøgdur við dagin.

- Hetta er ein veitsludagur hjá Skipasmiðjuni. Allir eru sera positivir. Hetta er spennandi at sleppa at smíða skip aftur, sigur Gunnar.

- Hetta er ein av merkidøgunum hjá Skipasmiðjuni, heldur Gunnar.

Gunnar váttar, at teir arbeiða við at fáa nýggjan sáttmála um at smíða skip.

- Vit arbeiða við tí. Eitt skip er als ikki nóg mikið. Vit hava gjørt eina stóra íløgu, og vit skulu helst smíða fleiri enn hetta eina skipið. Vit hava eisini ein sáttmála við póllendingarnar yvir fýra ár, og vit vilja helst nýta teirra førleika fult út hetta tíðarskeiðið. Tí er tað neyðugt at gera fleiri sáttmálar, staðfestir Gunnar.

### Ikki steðg millum skipini

Teir eru vónríkir um, at næsta uppgávan er klár, tá ið teir eru lidnir við hetta skipið hjá P7F Thor.

- Vit vóna avgjørt, at vit hava næstu uppgávuna klára, tá ið hetta skipið verður liðugt. Tað skal helst ikki koma stígur í arbeiðið, nú vit aftur eru farnir í gongd við at smíða skip, sigur Gunnar.

Hann sigur, at allar uppgávur hava áhuga. Sostatt nýtist tað ikki at vera fyri eitt føroyskt felag, ið teir smíða skip fyri.

- Allar uppgávur, sum passa í støðd og førleika, eru áhugaverdar fyri okkum, sigur Gunnar Mohr at enda.